## DAGSINS MEINING

# Postverkið aftur í tronga – 40 ársverk rúka!

Postverk Føroya hevur verið í eini turbulentari støðu í fleiri ár, og í hesum valskeiðnum er bara gingið afturá! Hvussu lítla virðing landsstýrissamgongan hevur fyri Postverkinum sást, tá Løgtingið fór til hús fríggjadagin í summarfrí. Uppskotið um postvirksemi hevði ikki fingið ta endaligu viðgerðina í løgtingsnevnd og kom ongatíð framaftur. Málið dettur sostatt burtur! Avleiðingin av hesum er, sambært tí sum Bjarni Djurholm segði í Rás 2 fríggjakvøldið, at eini 40 ársverk rúka!

Uppskotið um postvirksemi sigst vera fyritreytin fyri nýggjum bygnaði og inntøkumøguleikum. Møguleiki skuldi gevast fyri at kappast við privatar flutningsfyritøkur á jøvnum føti. Hesar fyritøkur, sum kunnu lata eina góða tænastu, hava tikið seg upp tey seinastu árini, samstundis sum tænastan hjá Postverkinum støðugt er sigld afturút.

Mønustingin gav Postverkið sær sjálvum, tá verkið gavst at bera út post leygardag, og bløðini noyddust sjálvi at bera bløðini út. Men spurningurin um kostnað fyri bløðini, hevði at enda við sær, at Dimmalætting og Sosialurin skipaðu sína egnu útberingardeild í høvuðsstaðnum fyri hinar vikudagarnar eisini.

Postverkið minkaði tænastu sína fyri at spara og sleppa undan at siga fólki upp. Um Postverkið hevur ov nógv fólk, ella um tað er ov illa fyriskipað, ber ikki til hjá teimum, sum standa uttan fyri, at meta um. Men vanligi borgarin hevur bara merkt eina verri tænastu: eingin útbering aftansdagar og leygardagar, styttar upplatingartíðir og bygdir hava mist útberingardagar.

Politiski myndugleikin má ásanna, at tað er neyðugt at hava eitt postverk við ávísum skyldum, so øll fáa post. So má Løgtingið annaðhvørt játta Postverkinum tann pening, sum er neyðugur, ella umskipa Postverkið skjótast møguligt, so tað sjálvt fær útvegað tær neyðugu inntøkurnar, samstundis sum skyldan at bera post út, verður hildin.

Henda støðan kann ikki halda fram – hvørki fyri postfólk ella borgaran, sum hevur krav uppá eina posttænastu. Skommina, vit eru komin í, eigur landsstýrið, hóast Bjarni Djurhom beklagar!

**Sosialurin**

Grannastevna 2001

# Rimmar harmonikutiltak á Hálsi

***Harmonikutiltakið Grannastevna 2001 verður í Ítróttarhøllini á Hálsi 26. mai kl. 21.00.***

Eins og í fjør verður aftur í ár skipað fyri rimmar harmonikutiltaki í Ítróttarhøllini á Hálsi. Tiltakið verður leygarkvøldið 26. mai og fleiri kendir bólkar, eins og einstaklingar, koma at luttaka.

Hesaferð verða tað ikki bara føroyingar, ið luttaka í tiltakinum men eisini gestir úr Íslandi, Grønlandi og Noregi, sum eisini er orsøkin til heitið av harmonikutiltakinum.

Nú líkist hetta eini grannastevnu, sum upprunaliga varð ætlað. Umframt at hesi lond eru okkara grannalond, hava tey eisini ein málsligan felagsskap, tí fyrr varð norðurlendskt eisini nýtt í Grønlandi og Hetlandi.

Upprunaliga varð norðurlendskt tosað í Skandinavia, men tá ið teir norsku víkingarnir fyri einum 1000 árum síðani fóru sínar víkingaferðir vestureftir, komu teir m.a. til Føroya, Íslands, og tær bretsku oyggjarnar, Orknoyggjar, Hetlands og partar av Skotlandi og aðrastaðni og settu seg niður í hesum støðum.

Soleiðis fekk tað norrøna málið stóra útbreiðslu í økinum her úti í Norðuratlantshavinum. Tá kundu hesi fólk tosa sínámillum hvør á sínum máli – og skilja hvønn annan. Men tað er nú langt síðani, og í dag er støðan ein heilt onnur, við tað at tað norrøna málið í Orknoyggjum, Hetlandi og Grønlandi doyðu út, og tey nýta nú enskt, ávikavist grønlendskt.

Hesin málsligi og mentanarligi felagsskapur hevur við sær, at fólkið í hesum londum hevur nakað til felags. Fólkið er av somu rót og hevur havt og hevur lutvíst enn somu mentan, og tað sæst m.a. aftur í tónleikinum, tí verður tað hildið hóskiligt at geva stevnuni heitið Grannastevna.

Føroysku luttakararnir á Grannastevnuni verða: Harmonikufelag Føroya og Johan Mortensen's Trio, Blakk úr Havn, Tvøroyrar Harmonikulið, Spælimenninir úr Klaksvík, Berg & Jacobsen's Danseorkestur og Juel & Vinmenn.

Úr Íslandi koma Grettir Bjørnsson, Ørvar Kristjánsson og Karl Jónatansson v/ komp.

Karl Lynge og Peter Hanneken koma úr Grønlandi og Morten Bollerud úr Noregi.

Lagt er upp til eitt spennandi og undirhaldandi kvøld.

Sambært skránni fyri Kvøldmál verður framsýning v/ Dansifrøi, har orkestrið Blakk spælir, felagssangur v/ Hilmar Jan. Árni og Hentzar spæla. Vit fara at hoyra Tórshavnar Manskór, sum kemur at seta sín serliga dám á tiltakið. Óli og Juel spæla undir hjá kórinum.

Nevnast kann at Ørvar Kristjánsson er rættiliga kendur um okkara leiðir. Morten Bollerud úr Noregi er kanska ikki so kendur um okkara leiðir og heldur ikki grønlensku gestirnir, men felags fyri allar teir útlendsku luttakararnar er, at teir eru allir væl kendir og hartil umhildnir í heimlondum sínum.

Endað verður við eini rimmar finalu, har øll orkestrini spæla saman.

Undir grannastevnuni verður møguleiki at keypa sær okkurt til matna og at leska sær við. Hesum partinum av tiltakinum fer flogbóltsfelagið Fleyr at standa fyri.

Atgongumerkið kostar kr. 140,- og kann útvegast á Kunningarstovuni í Havn.

Tíðindaskriv:

## Hendur & Hugflog 2001

### Søluframsýning fyri føroyskt listhandverk og heimavirking

Í døgunum 20. - 22. juli verður Ítróttarhøllin á Hálsi í Havn aftur karmur um stóru summarsølustevnuna Hendur og Hugflog, sum var hildin fyrstu ferð í 1997.

Høvuðsdenturin verður lagdur á at fáa luttøku frá listhandverkarum, heimavirkisfólki og øðrum, ið fáast við líknandi ikki ídnaðarkenda framleiðslu.

Endamálið við sølustevnuni er at gera vart við føroysk handaverk og at geva teimum, ið framleiða, møguleika fyri at hitta stórt tal av keyparum, og ikki minst at hitta aðrar framleiðarar, soleiðis at hin einstaki á henda hátt kann mennast í handaverkinum.

Roynt verður at menna samstarvið við grannalondini, og eitt úrslit av hesum er, at føroysk handverksfólk fleiri ár á rað hava luttikið á líknandi framsýning í Íslandi, og í hesum mánaðinum fara 3 føroysk handverksfólk at luttaka á søluframsýning í Nuuk í Grønlandi. Vit hava bjóðað handverkarum úr Orknoyum og Íslandi at luttaka á stevnuni sum gestaframsýnarar.

Tað hevur stóran týdning fyri sølustevnuna, at hon er fjøltáttað og at hon hevur eitthvørt nýtt at bjóða á hvørjum ári, og fyri handverksfólkið hevur tað tann týdning, at tey fáa samband við útlendskar starvsfelagar, soleiðis at tey á henda hátt eisini íblástur uttanífrá.

Á sølustevnuni vera sýningar, har fólk virka. Eisini verða móta- og vørusýningar og onnur áhugaverd tiltøk.

Føroya Heimavirkisfelag og Menningarstovan fyrireika stevnuna.




Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo

Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Útgevari/uppseting:**
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Nýskapandi tilboð á røktarheiminum í Runavík



*Eysturoyar Røktar- og Ellisheim verður eftir ætlan útbygt við 24 búplássum aftrat*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Eysturoyar Røktar- og Ellisheim verður eftir ætlan víðkað við 24 plássum, sum umfata bæði vanlig røktarpláss og pláss fyri fólki við ymsum bráðfeingis tørvi**

ELDRARØKT
*Edvard Joensen*

**Runavík:** Eysturoyar Røktar- og Ellisheim skal byggjast út fyri 22 milliónir krónur. Talan er um nýhugsan á røktarheimsøkinum, sigur fyristøðumaðurin.

Ein nevnd, sett av stýrinum fyri Eysturoyar Røktar- og Ellisheim í Runavík er komin við uppskoti um at víðka røktarheimið við 24 plássum, sum umfata bæði vanlig røktarheimspláss og aðrar, ikki fyrr royndar møguleikar.

Tordur Niclasen, fyristøðumaður á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, sigur, at ætlanin umfatar fýra uppvenjingarpláss, tvey pláss til náttilhald, umframt at ætlanin er at hava tvey pláss til bráðfeingis innleggingar. Hini 16 plássini, útbyggingin fer at umfata, verða til vanligar røktarsjúklingar.

Tordur Niclasen sigur, at Røktar- og Ellisheimið er væl útgjørt við fysioterapi, ergoterapi og einum venjingarhyli. Tilboð verður so til fólk, sum hava verið til uppvenjingar aðrastaðni, men sum av einihvørji orsøk eru givin. Hetta vera ikki permanent tilboð, men ein møguleiki at koma til uppvenjingar einar seks vikur tvær ferðir árliga ella so, sigur fyristøðumaðurin.

Um tørvin á nátttilhaldi sigur Tordur Niclasen, at tað eru fólk, sum klára seg væl um dagin undir vanligum umstøðum, men sum hava tørv á meira vakt um náttina. Møguleiki verður eisini givin í hesi útbygginingini at taka eini tvey slík fólk inn á heimið um náttina.

Eisini verður latið upp fyri møguleikanum at leggja røktarsjúklingar inn bráðfeingis, tá okkurt akutt berst á hjá avvarðandi ella øðrum, sum annars eru um fólk, sum ikki klára seg sjálv. Hesar bráðfeingis innleggingar fara eftir ætlan at vara hægst eina fjúrtan dagar, meðan onnur loysn verður funnin, sigur fyristøðumaðurin.

Hesar nýggju møguleikarnar, Eysturoyar Røktar- og Ellisheim fer undir, nevnir fyristøðumaðurin fyri røktarheimsfyribyrgjandi tiltøk.

Eisini verður hugsað um at fara undir dagtilhald á Røktarheiminum, sigur Tordur Niclasen. Hann sigur, at tørvurin er stórur og alsamt vaksandi, eins og hann er á eldraøkinum yvirhøvur. Hann vísir á, at framrokningar vísa, at talið á pensionistum í Eysturoynni fer at vaksa við knapt 300 fólkum, ella 24%, í tíðarskeiðinum frá 1996 til 2016.

Hendan útbyggingin, sum eftir ætlan verður gjørd á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi, fer at skapa munandi fleiri valmøguleikar enn teir, sum í dag eru. Og tørvurin er stórur, sigur Tordur Niclasen.

– Tað er óhugnaligt, sum støðan er vánalig hjá fólki nógvastaðni í dag, sigur hann. Fólk liva í ávísum førum undir beinleiðis mannminkandi umstøðum, sigur hann.

Tordur Niclasen sigur, at hóast eingin avgerð er tikin um byggingina enn, hevur hann góðar vónir til, at hon verður veruleiki. Fundur hevur verið við landsstýrismannin við Almanna- og Heilsumálum, og hann var positivt innstillaður til málið.

Samlaði kostnaðurin fyri útbyggingina verður mettur til 22 millónir krónur, og søkt er um 100 prosent fígging frá tí almenna, sigur Tordur Niclasen.

